


**Nr. 19** ***13. septembur 2026*** **86. árg.**

# „Stumm-tænari“

Tá ið eg búði í Albania, keypti eg ein dagin ein „stummtænara“, eitt klædnatræ at heingja tey vátu, skitnu klæðini á, tá ið vit komu til hús. Tað regnaði ofta, og runa var allastaðni. Eg spurdi ein av vinum okkara, hvat ið „stummtænari“ eitur á albanskum. Hann eitur „prift“, og tað merkir prestur.

Nú eru prestar ikki beinleiðis kendir fyri at vera málleysir, „stummir“, kanska heldur fyri at vera ov prátingarsamir, so eg helt, at hetta var eitt løgið navn. Men tá ið eg hugsaði gjøllari um tað, sá eg, at tað í roynd og veru hóskar væl at kalla ein „stummtænara“ prest.

Í Hebrearabrævinum 9. kapitli verður Jesus kallaður høvuðsprestur okkara, og í Jesaja 53. kapitli um Harrans líðandi tænara spáar profeturin um Jesus: „Hann varð nívdur, men stillisliga bar hann tað, og hann læt ikki upp munn sín eins og lamb, ið verður leitt at verða dripið, eins og seyður, ið er tigandi, tá ið teir royta hann; hann læt ikki upp munn sín.“

Jesus, okkara himmalski høvuðsprestur, er ein tigandi, „stummur“ tænari, sum í stilni líður okkara vegna. Hann letur seg heingja upp á ein kross sum ein ránsmann. Nú kunnu vit koma yvir til hansara á krossinum, lata okkum úr øllum okkara skitnu yvirklæðum, t.e. syndir okkara, og heingja alt á hann sum ein „stummtænara“. Harvið loysir hann okkum frá syndanna byrðu, sum tyngir okkum, og vit kunnu standa í reinum, hvítum klæðum, ílatin rættvísi hansara, verdug at tæna honum í dagligu gudstænastu okkara, í bøn og bíbliulestri og í okkara jarðiska kalli.

Tá ið vit nú halda páskir, so latið okkum hugsa um, hvat ið tað kostaði Jesusi at vera høvuðsprestur okkara: at hann sjálvur gjørdist offurlambið, hvørs blóð er tað einasta, sum kann bøta fyri syndir okkara, at hann doyði fyri okkum, hann, sum ikki kendi til deyða, men gekk heilt og fult inn undir manna kor, enntá sjálvan deyðan, so at eingin okkara kann siga: „Gud, tú skilir ikki meg, tí tú veitst ikki, hvat ið tað hevur at týða at vera menniskja."

Jú, Gud veit alt um, hvat ið tað vil siga at vera menniskja, tí Jesus er sannur Gud og tað æviga lívið. Tá ið vit loyva Jesusi at koma inn í hjarta okkara, so fáa vit eisini lut í hansara guddóms megi og mátti at bera alt, sum er tungt í lívi okkara.

*Henrik Ertner Rasmussen, Dansk Europamission.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Jesu kærleiki

*Jesus kom niður her at gjalda eina skuld, sum hann einki átti í, av tí at vit høvdu eina skuld, sum vit ikki vóru før fyri at gjalda.*

Tað, sum hevur kostað nógv, vilt tú treyðugt missa.
Og tí vil Gud treyðugt missa teg. Hann hevur keypt teg leysan.
**Tí so elskaði Gud teg og meg, at hann gav:**
**ORÐ SÍTT** – *fyri at vit skulu kenna sannleikan.*
**EITT PORTUR** – *fyri at vit kunnu ganga inn í kongsríki hansara.*
**HEIMSINS LJÓS** – *fyri at vit ikki longur skulu ganga í myrkri og vónloysi.*
**LÍVSINS BREYÐ** – *at metta okkara svongu sálir.*
**HITT LIVANDI VATNIÐ** – *at endurnýggja okkum.*
**UPPREISNINA OG LÍVIÐ** – *fyri at vit kunnu liva ævigt saman við honum. Trúgvin á Jesus ger tingini gjørlig – ikki løtt.*

*Debora Bank Larsen. LMF-blaðið.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Hann gloymdi eitt

Hann var altíð í galosjum, tá ið tað regnaði. Tvær ferðir um dagin bustaði hann tenn við einum altjóða viðurkendum tannkremi.

Læknin kannaði hann tvær ferðir um árið. Hann svav fyri opnum vindeygum og fekk sær hvønn dag nóg mikið av frískum grønmeti. Hann spældi tennis; men ongantíð meir enn ein tíma um dagin.

Hann legði sær eina við at sova minst átta tímar hvørja nátt. Hann roykti og drakk ongantíð – og hann gjørdist ongantíð sintur. Hvønn dag gjørdi hann morgunfimleik, og hann hevði góðar vónir at liva, til hann varð 100 ár.

Hann fer til gravar nú mikudagin. Áðrenn hann doyði, høvdu átta serfrøðingar og tveir sjúkrafimleikarar viðgjørt hann, og rundan um hann stóðu dunkar við heilsudrykkjum – og sóttreinsandi heilivági.

Men tað var bara í einum, hann fór skeivur.

Hann gloymdi Gud og livdi, sum henda verð var alt – og nú er hann teirra millum, sum vit kunnu siga um:

„Kornið er fingið til høldar og aldinskurður at enda, men vit, vit eru ikki frelstir!“ (Jerem. 8,20).

„Tí hvat gagnar tað manni at vinna allan heimin og bøta aftyrfyri við sál síni? Tí hvat man maður kunna geva sum viðurlag fyri sál sína?“ (Mark. 8,36–37).

*„Brevet“ – Effie Campbell* umsetti.

# Frú Bønamøti

Fyri stuttum doyði frú Bønamøti. Hon búði í einari meinigheit, sum kallaðist Líkasæla, har hon varð borin í heim fyri mongum árum síðani undir einari stórari veking. Hon mettaði seg av livandi vitnisburðum og takkarbønum og vaks tí skjótt upp og gjørdist ein av teimum týdningarmiklastu og virksamastu í meinigheitini.

Men tey seinnu árini hevur frú Bønamøti havt ringa heilsu, og hon sást sjáldan, av tí at hon hevur verið so stív í knøunum, og hon gjørdist ússaligari og ússaligari og misti heilt málið nú í seinastuni.

Tey, sum vitjaðu hana á sjúkraleguni, siga, at seinastu orð hennara vóru um handilsviðurskifti og undirhaldstilfar, og tá var røddin heldur veik.

Tveir dugnaligir læknar, læknin Góðar Gerðir og skurðlæknin Verðsligur, gjørdu sær ómak at geva henni innsprænningar við bygnaðarætlanar-penisillini og vitamintablettini „Nýtt arbeiðslag“, men alt til onga nyttu.

Tá ið líkið varð kannað, kom fram, at deyðaorsøkin var hungur. Hon hevði vanrøkt seg sjálva og ikki etið breyð sítt. Mannaótti hevði køvt røddina og vantandi gudsótti hevði oyðilagt andadráttin. Nú hvílir hon á kirkjugarðinum „Horvin Dýrd“.

*Úr Nord-Møre Indremisjonsblad.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Hurðin er opin

*Jesus sigur um seg sjálvan, at Hann er dyrnar:*
*„Eg eri dyrnar. Gongur nakar inn um meg,*
*skal hann verða bjargaður.“ Jóh. 10,9.*

Og hvussu gera vit so tað, at stíga inn um hesar dyr. Í Opb. 3,8 stendur: „Sí, eg havi latið dyr standa opnar framman fyri tær, sum eingin er mentur at lata aftur.“ Í Dahls Bíbliu stendur ikki orðið „framman“, men av tí at tað stendur í øllum øðrum Bíblium, havi eg loyvt mær at seta tað inn her.

Tá ið vit nú granska hetta orðið, so fáa vit so ótrúliga nógv gott burtur úr tí. Fyri tað fyrsta, so kemur tú ikki til einar læstar dyr. Tær eru opnar.

Fyri tað næsta, tørvar tær ikki at kaga aftur um teg ella til viks at leita eftir hesari hurðini, tí Harrin hevur sjálvur sett hesa hurðina beint framman fyri tær, lættari kann tað ikki verða. Fyri tað triðja, fáa vit at vita, at eingin kann lata hesar dyr aftur fyri okkum.

Men hurðin verður ikki opin um allar ævir. Ein dag letur Gud hana aftur, og tá ber ikki til at sleppa inn og bjarga sær. Tað hoyra vit so væl í frásøgnini um Nóa ørk.

Hurðin stóð upp á víðan vegg leingi, men at enda læt Gud hana aftur. So brúka høvið nú, tak stigið. Sig við Harran: „Kom inn í mítt hjarta sum Harri og Frelsari. Fyrigev mær allar mínar syndir. Bjarga mær og frels meg. Amen!“

*Effie Campbell.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. sept. | **Tekstur:** | Jóh. 4,5–30 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 4,14a |
| 20. sept. | **Tekstur:** | 1 Mós. 12,1–5; 18,1–15 | **Bíbliuorð:** | Sl. 143,8b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 20** *27. septembur 2026* **86. árg.**

# Hjálp fyri tey niðurboygdu

Kæri vinur, latum okkum tosa saman eina løtu. Ert tú niðurboygdur? Kennir tú teg sum hitt størsta ólukkudýr á jørð? Sigur tú, at tú ert djúpt sokkin í synd og veitst tær ongan útveg? Er lívið ein byrða fyri teg? So havi eg eini góð tíðindi at bera tær! Jesus doyði á krossinum fyri syndarar! Bið til hansara, so verður tú frelstur! Hetta er loysningurin til vandamál títt.

Ert tú komin so langt, at tú sært teg sum ein syndara, kanst tú vera lukkuligur, tí, sum nevnt, tað var fyri syndarar, at Jesus doyði. Bið Jesus beint nú, har tú ert staddur, fyrigeva tær tína synd og broyta lív títt. Bið hann taka búgv í hjarta tínum. Tá vil hann gera tað, og hann hevur gávur sínar við: frið og gleði.

Hetta kanst tú vita heilt vist, tí Harrin sigur ikki ósatt, hvørt einasta bíbliuorð stendur fast og vikast ikki. Í hesum bíbliuorðinum, sum stendur í Opinberingini 3,20, sigur Jesus: „Sí, eg standi við dyrnar og banki uppá. Um einhvør hoyrir rødd mína og letur upp dyrnar, tá **skal eg fara inn til hansara**.“

So vil eg so fegin deila eitt annað bíbliuorð við tær. Hetta bíbliuorðið kundi gott havt yvirskriftina „Frelsuvissa“. Tað stendur í fyrsta Brævi Jóhannesar 5. kapittul, 13. vers: „Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at tit skulu **vita**, at tit **hava ævigt lív**, tit, sum trúgva á **navn Guds sonar**.“

Tá ið tú ert frelstur, kæri vinur, mást tú lesa í Bíbliuni hvønn dag. Hetta er føði fyri sálina, fyri at tú kanst vaksa tín andaliga vøkstur. Tú mást biðja hvønn dag, bið t.d. morgun, onkuntíð mitt um dagin og um kvøldið. Tað er so gott at vita, at Harrin hevur ikki summarfrí ella telefontíð, hann er altíð til reiðar at lurta eftir tær.

Fyri at styrkna, mást tú eisini koma saman við Guds børnum. Tú sigur kanska: „Eg havi ikki dirvi at fara í kirkju ella møti. Tey kenna meg og vita, hvussu eg havi livað. Tey eru øll so góð!“

Eg vil bert minna teg á eina søgu, Jesus einaferð segði frá. Tað vóru tveir menn, sum fóru niðan í halgidómin at biðja. Annar var ein tollari, og hann føldi seg illa, skal eg siga tær. Hann hugdi bert niður og sló seg fyri bringuna og segði hesi orð: „Gud náði meg syndara!“

Jesus segði sjálvur, at hesin fór rættvísgjørdur (tað vil siga: reinur) til hús, meðan farisearin, sum reksaði upp alt tað góða, hann gjørdi, fór ikki rættvísgjørdur heim. Hví? Tí hann kendi seg so og so góðan. Hann megnaði alt sjálvur. Hann hevði ikki brúk fyri Jesusi ella hansara náði. Honum nýttist ikki Jesu blóð at reinsa seg við. Á, hvussu syrgiligt við sovorðnum sjálvrættvísum menniskjum, tí eingin kemur uttan um Jesus.

*Tann, ið kemur til mín, eymt hann segði,*
*eg koyri ei burtur frá mær,*
*og hann dró meg so tætt til sítt hjarta,*
*sum eg ongantíð áður var;*
*tonk, hann segði, eg var honum kærur,*
*og hvat goymt mær í Himlinum er;*
*tí eg gleða meg kann sum ein fuglur,*
*ið loystur úr snerruni fer.*

*Effie Campbell.*

# Ein útvald slekt

„Men tit eru ein útvald slekt, ein kongaligur prestaskapur, ein heilag tjóð, eitt ognarfólk, fyri at tit skulu boða frá dygdum hansara, sum kallaði tykkum frá myrkrinum til sítt undurfulla ljós;“ 1. Pet. 2,9.

Tá ið eg ein dagin kom koyrandi gjøgnum býin, sá eg eitt lítið skelti á rútinum í bilinum, sum koyrdi framman fyri okkum. Har stóð: „Mín meistari er ein jødiskur timburmaður.“

Eg skilti ikki í fyrstani, hvat ið hetta meintist við; men so spurdi eg mannin, sum eg hevði við í bilinum, hvussu hesin setningurin skuldi skiljast, og hann svaraði púra einfalt: „Hann er ein kristin.“

*e.c.* ums.

# Ein einføld bøn

Undir einari veking í Skotlandi fyri mongum árum síðani kom ein ung bygdargenta í stóra syndaneyð. Hon fór tí til prestin at tosa við hann um, hvat ið hon skuldi gera fyri at blíva frelst.

Presturin lurtaði eftir henni og tosaði blídliga við hana. At enda gav hann henni tey ráð at lesa í Bíbliuni og biðja til Guds, so vildi alt blíva gott.

„Ja, men eg dugi ikki at lesa – tað havi eg ongantíð lært, og eg havi ikki skil fyri at biðja," segði hon. Men í somu løtu suffaði hon út av sínum sorgarbundna hjarta: „Harri Jesus, tak meg, sum eg eri."

Nýtist okkum at siga, at hennara einfalda bøn bleiv hoyrd, og Jesus frelsti sál hennara? Tá ið Eliza Hamilton seinni hoyrdi um umvendingina hjá hesari skotsku gentuni, skrivaði hon hin kenda sangin „O Harri Jesus, hoyr nú meg."

*(Nr. 367 í Heimamissións sangbókini.)*
*Effie Campbell* umsetti.

# Spýta á Bíbliuna

Tað eru ikki so nógv ár síðani, at Cambodia bleiv kommunistiskt. Kommunistarnir fóru inn í kirkjur av øllum sløgum, meðan fólkið var til gudstænastu. Í tí katólsku kirkjuni tóku teir eina mynd av Jesusi, sum stóð við altarið. Í einari evangeliskari kirkju tóku teir Bíbliuna av prædikastólinum og løgdu hana út í tún. So kravdu teir, at kirkjufólkið skuldi koma út, eitt í senn. Sagt var við tey, at um tey spýttu á Bíbliuna, skuldu tey verða frí, annars vórðu tey skotin.

Mangar hugsanir fara gjøgnum heilan eina sovorðna løtu. Fyrsti maðurin, sum kom, var trúlovaður. Hann hugsaði: „Eg elski gentu mína, og hon elskar meg. Vit skulu skjótt giftast. Hjarta hennara brestur, um eg verði dripin. Mær nýtist ikki at spýta so nógv, sum kommunistarnir vænta av mær. Eg spýti bert heilt lítið."

Annar maðurin, sum kom, hugsaði: „Bæði foreldur míni eru avlamin. Doyggi eg, er eingin at taka sær av teimum. Eg noyðist at spýta, so kann eg altíð biðja Jesus fyrigeva mær, tá ið eg komi til hús. Hann er altíð so mildur og góður."

Soleiðis kom ein fyri og annar eftir. Øll vóru tey kristin, og fyri løtu síðani høvdu tey sitið til gudstænastu. Nú, tá ið á stóð,

vildi eingin taka kross sín upp og verja Kristus. Men so kom ein 16 ára gomul genta. Tárini runnu stríð oman eftir kjálkum hennara. Hon fall á knæ og turkaði við ermu síni spýttini av, so segði hon: „Eg kann ikki spýta á kærleiksbrævið frá mínum brúðgómi. Eingin genta spýtir á brævið frá sínum elskaða vini." So skutu kommunistarnir hana, og hon datt deyð niður yvir sína kæru Bíbliu. Men beint aftaná blivu hini, sum høvdu spýtt, eisini skotin. Kommunistarnir brutu lyfti síni.

Jesus sigur hesi álvarsomu orðini: „Tann, ið elskar faðir og móður meir enn meg, er mær ikki verdur; og tann, ið elskar son ella dóttur meir enn meg, er mær ikki verdur. Og tann, ið ikki tekur kross sín og fylgir mær eftir, er mær ikki verdur. Tann, ið bjargar lívi sínum, skal missa tað; og tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal bjarga tí." Matt. 10,37–39.

Um tú fekst tvinnar kostir í at velja, annaðhvørt at spýta á Bíbliuna ella at doyggja, hvat hevði tú so valt? Ja, hugsa teg væl um.

Tað eru annars fleiri mátar „at spýta á Bíbliuna". Um tú ongantíð lesur í henni, so spýtir tú í roynd og veru á hana, tí tá vanvirðir tú hana. – Les í Bíbliu tíni hvønn dag og fá tær góða andaliga føði til at standa ímóti dagsins trupulleikum og stríði við.

Hetta stykkið er skrivað, eftir at eg hevði hoyrt eina talu eftir Rickard Wurmbrand. Talan varð hildin fýra ár eftir, at kommunistarnir hersettu Cambodia.

*Effie Campbell.*

---

**Kvinnur, reisið tykkum. Verið ein Ester.** Hon fór í forbøn fyri landi sínum og bjargaði tí. Job fekk dupult so nógv aftur, tá ið hann fór í forbøn fyri vinum sínum (Job 42,10). ***Double for the trouble,*** sum bretar siga.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 27. sept. | **Tekstur:** 1 Mós. 21,1–5; 22,1–19 | **Bíbliuorð:** Ják. 2,23 |
| 4. okt. | **Tekstur:** 1 Mós. 24,1–67 | **Bíbliuorð:** Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74